# URNAR FRAM SJÁLV










flaggstongin stendur, eru lampur, sum hon kann tendra um kvøldið.

– Tá er ikki minst hugnaligt her.

Í einum króki standa borð og stólar, og undir einum veggi eru tríggir stórir steinar koppaðir á soleiðis, at teir kunnu brúkast sum borð

Og stólar.

## Vildi nakað annað

Í garðinum er stórur grasvøllur. Hann hevur ongantíð verið veltur, og tað sæst av, at mógvur er undir. Vøllurin er alla tíðina hildin sum einhvør annar grasvøllur, er taðaður og sligin.

Elsebeth sigur, at urtagarðurin var væl hildin, men hon vildi hava hann øðrvísi. Tí fór hon undir hetta stórarbeiðið.

Vísir tað seg, at onkur planta ikki stendur á rætta stað, flytir hon hana alt eftir sólarganginum. Niðast í garðinum eru trø stáplað. Tey fara í hvørnina hjá Elsebeth. Beint við hevur hon ein sankutøðkassa.

Har niðri hevur Niels Pauli saksað moldina, tí tey hava eisini nakað av eplum og rabarbum.

– Tað eru vínrabarbur, sum stava frá ommu. Eg hevði tær í Klaksvík í 30 ár, og nakað er eftir hjá øðrum av syninum í Klaksvík.

Vespurnar eru farnar at síggjast og hoyrast. Tað eru drotningarnar, sum fyrireika seg til at byggja reiður.

Elsebeth heldur, at áhugi hennara fyri plantur er nakað, sum liggur í henni. Hon hevur ikki lært nakað, men hevur bara følt seg fram og harvið fingið royndir.

– Áhugan hava eg altíð havt.

– Eg minnist, at eg sum barn gekk og sáddi ymist uttan fyri hús okkara í Klaksvík, og so skjótt sum tað fór at næla, át seyðurin alt av. Men eg royndi bara aftur.

Hon varð fødd í Danmark undir krígnum og hevði ommu og abba har. Tað besta hon visti, var at fara niður at ferðast hjá teimum, tí tey høvdu so nógv berjatrø í urtagarðinum.

– Tað liggur eisini í mammusa ætt á Húsum. Har vóru stór trø. Tað stuttliga var eisini, at abbasystir mín giftist til Havnar við Trónd Hansen. Eg var ofta við mammu inni hjá teimum.

## Virðislønir

Tá ið Klaksvíkar kommuna í 1984 skipaði fyri kapping um vakrasta urtagarð, kom tað púra óvart á Elsebeth, at hon skuldi fáa fyrstu virðisløn.

– Urtagarðurin var tá als ikki liðugur, og vøllurin ikkii gjørdur. Men tá vóru ikki so nógvir urtagarðar.

Í 2005 fekk Elsebeth enn eina ferð fyrstu virðisløn í Klaksvík fyri sín urtagarð.

– Eg var líka bilsin tá. Vit vistu ikki av nøkrum, tá ið vit vórðu biðin um at koma í býráðshøllina til handanina av virðislønum. At vit skuldu fáa fyrstu virðisløn grunaði eg ikki, tí tað vóru so nógvir aðrir vakrir urtagarðar, sigur Elsebeth.

Hon gremur seg um, at hon ikki hevur gjørt so nógv í urtagarðinum í vár, sum hon gjarna vildi. Ryggurin hevur bilað.

Men fyri tað gevst hon ikki so. Tað ger einki, um arbeiðið tekur sína tíð, og hon hugnar sær millum allar planturnar.